Ársins jólagáva

BARNAFLØGAN 2005

Fæst til keyps kring Landið

Verið við í lutakastinum og vinn eina fløgu

Drigið verður um 10 fløgur

Hvør vann Nósabarnaprix 2005?

Eitur Hon: Set X

1. Madonna? ☐

2. Eivør Pállsdóttir? ☐

3. Johanna Niclasen? ☐

KAPPING

Klipp lepan út og send til:
Barnafløgan 2005
boks 1152 110 Tórshavn

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Húsaumsitingin

hjá kommununi umsitir yvir 100 bygningar. Hesir eru, umframt umsitingarbygningar, svimjihallir, fimleikahallir, leiguíbúðir, býlingshús og dagstovnar, skúlar og aðrir.

Í húsaumsitingini starvast 3 húsavørðar.

-leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

Ráðhúsavørður

Tórshavnar kommuna søkir eftir ráðhúsavørði.

Sum ráðhúsavørður hevur tú ábyrgd av at halda ráðhúsið, býráðssalin, umsitingarligar bygningar, móttøkuhúsið, smiðjuna í Lítluvík, Heinesens hús, úthúsið og Mullers Pakkhús rein og nosslig. Arbeiðsuppgávurnar verða gjørdar í tøttum samstarvi við stjórnarskrivstovuna.

Arbeiðsuppgávurnar eru m.a. at:
- syrgja fyri at tað er reint og ruddiligt, eisini uttanum bygningarnar
- syrgja fyri at trygdarútbúnaðurin lýkur ásett krøv
- flaggað sambært ásetingum
- goyma amboð, innbúgv og tilfar á tryggan hátt
- beina burtur rusk
- seta borð upp v.m.

Kommunan roknar við at tú:
- hevur eyga fyri, at hampuligt og nossligt er innan- og uttandura, ansar eftir og boðar frá tørvi á ábótum og kemur við hugskotum til betringar
- ert ábyrgdarfullur, ágrýtin og til reiðar at arbeiða sjálvstøðugt undir skiftandi umstøðum
- ert røkin og hevur lætt við at samskifta
- ert handaligur

Koyrikort er neyðugt fyri at røkja starvið.

Setanarviðurskifti
Starvið verður sett sambært fastlønarsáttmálanum millum Havnar Arbeiðsmannafelag og Havnar Arbeiðsgevarafelag. Fyri at flaggað verða 1000 kr latin í viðbót. Nakað av arbeiði er uttanfyri vanliga arbeiðstíð, sum verður avspákað.

Meiri fæst at vita
um starvið við at venda sær til Eivind Danielsen, leiðara á húsaumsitingini ella Bjørgfríð Ludvíg, miðfyristingingarstjóra, tlf. 302010.

Umsókn
Saman við viðmælum og upplýsingum um royndir skal vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 4. januar 2006 kl. 16.00.

Viðmerk á brævbjálvan "ráðhúsavørður".

www.sosialurin.fo Leyst starv á Sosialinum

Blaðfólk

Á redaktión okkara er spennandi, avbjóðandi og fjølbroytt starv sum blaðfólk leyst.

Starvið fevnir fyrst og fremst um at røkja uppgávur á høvuðsredaktiónini í Vágsbotni. Hartil er ynskiligt, at viðkomandi eisini røkir aðrar uppgávur kring landið. Fyrst og fremst í Norðoyggjum.

Vit hugsa okkum, at tú skalt byrja í starvinum um 15. januar, men er tað ynskiligt, er møguleiki eisini at byrja fyri hetta. Er talan um rætta umsøkjaran, kunnu vit eisini bíða til 1. februar.

Við rokna við, at tú er ein persónur við áræði at fara undir nýggjar uppgávur, har tað ofta ræður um at skjótt at kunna seta seg inn í tey viðurskifti, sum talan er um. At tú ert uppsøkjandi og dugir at arbeiða sjálvstøðugt undir eini ásettari tíðarfreist.

Umsøkjarar við viðkomandi útbúgving hava fyrimun, men er hetta ikki nøkur treyt fyri starvssetanini.

Lønin er sambært avtalu millum Blaðútgevarafelagið og Blaðmannafelagið.

Er ynskiligt at frætta nærri um starvið, ert tú sjálvandi vælkomin at seta teg í samband við Jan Müller, blaðstjóra, á tlf. 341800. Ella við at senda teldupost á jan@sosialurin.fo

Seainsta freist at søkja starvið er 31. desember 2005, og skulu umsóknir við viðkomandi upplýsingum sendast til:

Sosialurin
Jan Müller
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blaði. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.

Internet

Sosialurin www.sosialurin.fo

Programmedarbeiðarastørv

Í Kringvarpi Føroya eru nøkur programmedarbeiðarastørv leys at søkja fyri medarbeiðarar, sum eru farnir úr starvi.

Starvslýsingarnar eru at síggja á heimasíðunum hjá kringvarpinum **svf.fo** og **uf.fo**

Umsóknirnar skulu vera Kringvarpi Føroya í hendi í seinasta lagi týsdagin 27. desember 2005.

Kringvarp Føroya

Norðara Ringvegi · Postboks 1299 · 110 Tórshavn · Tel 34 75 00

Elektrikari

Elektrikari søkist til áhugavert el-arbeiði. Tú má kunna arbeiða sjálvstøðugt.
Góð kor til rætta fólkið.

Skrivlig umsókn at senda til.
elmek
Gripsvegur 18.
100 Tórshavn
tlf: 317352